| **Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri** | | | |
|---|---|---|---|
| Dagur: 26.feb. 2018<br>Tíð:kl 18.00 – 21.00 | | Luttakarar: Allan, Vivian, Jóhan, Bjørg, Bergun, Bjørghild og Marjun<br><br>Ikki møtt: | |
| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi | Fundarfrásøgnin undirskrivað. | |
| 2. | Bussleiðin | Teldupostur er komin frá Vivian, tí at nøkur foreldur hava vent sær til hennara viðvíkjandi bussleiðini nr. 1 niðan á Hamaran.<br>Kommunan veit um málið, fólk hava gjørt vart við seg.<br>Spurningurin er, um skúlastýrið skal blanda seg uppí tá ið talan er um vanligu ferðaætlan hjá bussinum, tí ynskir tú broyting fyri at betra støðuna hjá onkrum gerst hon verri hjá øðrum í økinum úti á Argjum<br>Væntandi verða broytingar í bussleiðini eftir summarferiuna, tá opnar Glasir og tá skal bussleiðin skipast av nýggjum.<br>Nýggj ferðaætlan verður eftir ætlan liðug um ein mánað.<br>Einki verður gjørt við hetta mál beint nú. | MH |
| 3 | Punktini frá foreldraumboðsfundinum | Viðmerkingar:<br>Tað at lærarar fóru avstað á námsfeð í ferium, tá ið skúlin hevði eina reglu,um at næmingar ikki fóru á námsferð, var eitt sindur óheppið.<br>Rundvísing og trivnaður<br>Foreldur at børnum í 1.flokki hevði fyri neyðini at verða víst runt á skúlanum, tí tey kendu ikki henda stóra skúlan.<br>Serliga vóru tað tey ymisku hølini børnini tosaðu um, sum tey ikki vitu hvar vóru.<br>Hetta var eisini galdandi fyri foreldur, tá børn teirra komu í aðrar flokkar, at tey kendu ikki skúlan, tá tey vóru nýggj á skúlanum.<br>Tað er neyðugt, at flokslærarin boðar frá tá nýggjur næmingur kemur í flokkin. Foreldraumboðini mugu syrgja fyri, at gera tey til lim í einum møguligum facebook | AM |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | bólki.Hetta skal tryggja, at foreldur skjótari kunnu verða kunnaði um, hvat fyri ferst.<br>Hvørjar uppgávur hava foreldraumboðiðni?<br>Hesin spurningurin var settur. Víst bleiv til ta gomlu mappuna til foreldraumboðini, men tann skipanin var ov tung og tvørlig. Ráðiligt er at finna eina meir einfalda mannagongd, hvørjar hesar uppgávur eru.<br>Somu foreldraumboð eru floksumboð og í felags foreldraráðnum, sum heldur áleið tveir árligar fundir. | |
| | | | | |
| 4. | Kunning um klubb-tilboð inni í skúla-num | | Ynski er frá Klubb 160,at fáa atgongd til tónleik, køk og drama í samband við at tey ætla at byrja Klubb 160 í kafe økinum og Látrinum.<br>Stemningurin á skúlanum er ikki fyri at hetta ber til.<br>Serhølini í tónleiki og køki hava nógva serútgerð til un-dirvísingina í hesum lærugreinum, sum ávísur vandi er fyri verður viðfari á ein slíkan hátt, at hølini ikki eru tøk til vanliga undirvísing.<br>Roknað verður við at hetta tilboð verður í vikuskiftinum og ein dag mitt í viku. Ætlanin er við tíðini tá í hølini uppi í frítíðarskúlanum eru útbygd, at Klubb 160 skal halda til har. | MH |
| 5 | Kunning | | Allan hevði verið á fundi í kommununi, har allir formenn í skúlastýrunum vóru innbodnir.<br>Eftirmeting av stórflokkum var eitt av evnunum,sum var á skrá. Onki bar til at  siga um tað eina var betur enn annað.<br>Felags leiðsla á skúla og frítíðarskúla, var ein royndarverkætlan kommunan hevði eina umsókn um hjá MMR.<br>Ætlanin var at gera ein og somu trivnaðarkanning á øllum skúlum í kommununi, eftir einum ávísum leisti so til bar at samanbera skúlarnar. | AM |
| | Ymiskt | | Spurningur um at taka seg úr skúlastýrinum, vegna aðrar uppgávur, viðførir at næsti á listanum av eykaumboðum gerast tey sum koma inn ístaðin. | MH |
| | | | | |